## DAGSINS MEINING

### Breið semja fáast um uppskot løgmans

Tað ljóðar áhugavert, at løgmaður ætlar sær í Tingið við einum uppskoti, ið miðjar eftir, at øll málsøki skulu kunnu yvirtakast av Føroya Landsstýri. Neyvan er nakar flokkur, ið hevur nakað ímóti hesum. Innihaldið av einum slíkum uppskoti er ikki ólíkt parti av Sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum, Nýskipanaruppskotinum hjá Sambandsflokkinum og uppskotinum hjá Fólkaflokkinum, ið var luftað av Bjarna Djurholm í farna valskeiði. Uppskotið er kanska ikki so víðgongt, sum sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum, men eitt stig rætta vegin er tað í hvussu so er. Eitt slíkt uppskot er í roynd og veru ein víðkan av Heimastýrislógini, og tí eigur andstøðan sum skjótast at fáa ein dialog við Løgmann, til tess at fáa eina breiða semju um hetta mál. Vónandi kemur at standa einmælt samtykt, tá hetta uppskot kemur fyri Tingið. Tó má nógv sigast at vera broytt. Minnast vit rætt, nærum háladi varaløgmaður, Høgni Hoydal, tilmælið hjá Bjarna Djurholm, sum snúði seg um hetta sama, sundur og saman ífjør, og orðini um landsstýrismannin vóru alt annað enn mjúk. Nú er vent í byttuni.

Gamaní var tað leingi at skula bíða í 5 ár eftir tí, ið meirilutin av Føroya fólki vil hava, men betri seint enn ongantíð. Tað var gott, at ljósið endiliga náddi fram í Tinganesi. Tað eigur heldur ikki at forða fyri samtykt av hesum uppskoti, at samgongan við ógvusliga blokkniðurskurðinum hevur skotið seg sjálva í fótin við at avmarka ráðini til yvirtøkur tey næstu árini.

Vit hava nú í fimm ár frá fullveldisveinginum fingið tútað oyrini full av, at tað ikki bar til víðka Heimastýrislógina ella gera eina nýggja meira víttfevnandi lóg innnanfyri ríkisfelagsskapin. Alt ella einki var rakstrarrópið. Fullveldi ella svart samband. Hvitabók tyktist enntá stuðla undir hesum undirbrotliga tosi. Hvat er uppskotið hjá Løgmanni um ikki ein víðkan av Heimastýrislógini? Danir vilja meta tað sum eina víðkan. Allir føroyskir flokkar við einum undantaki vilja meta tað sum eina víðkan. Hetta verður ein víðkan av Heimastýrislógini, og ein slík víðkan kemur ikki at ávirka okkara loysingarmøguleikar í framtíðini, tí líka so væl, sum vit kunnu loysa í dag eftir at hava góðtikið Heimastýrislógina í meiri enn hálva øld, líka so væl kunnu vit loysa um tíggju ár – um fólkið vil væl at merkja.

Tá nú Høgni Hoydal og Tjóðveldisflokkurin sum tann einasti flokkurin vil kalla uppskotið fyri nakað annað enn eina víðkan av okkara skipan innan ríkisfelagsskapin, so eiga hinir flokkar á Tingi at vera tolerantir, og lata Tjóðveldsiflokkin kalla uppskotið, tað hann vil. Navnið eigur ikki at skilja nakran. Tað má vera ringt at skula svølgja alt ella einki politikkin, og tí kunnu vit ikki annað enn vænta eitt sindur av trappusteinsretorikki frá Tjóðveldisflokkinum í samband við uppskotið frá Løgmanni. Flokkurin kemur ivaleyst at atkvøða fyri víðkanini av okkara sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin eins og øll onnur, og so kunnu teir fylla floksblaðið tey næstu 30 árini við stórorðaðum hugleiðingum um hvussu forferdiligt tað er, at allir hinir flokkarnir, danska stjórnin og verðin annars hevur miskkilt, hvat tað var, flokkurin atkvøddi fyri.

Nú verður kanska friður til at reka veruligan politikk aftur og nýta orkuna til at fokusera uppá trupulleikarnir, vit til dømis hava innan skúlaverkið og almanna- og heilsuverkið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ingi Rasmussen og Bent Jensen

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



Tað var ikki "Gulag og glemsel", sum fekk meg at taka til sum eg gjørdi í løgtinginum henda dagin, men heildin í drúgvføru ræðuleikunum og tíðarperspektivið

Í »Vikuskiftisblaðnum« í Sosialinum seinasta leygardag hevur blaðmaðurin Ingi Rasmussen bókina »Gulag og glemsel« hjá Bent Jensen á hondum og ger sær sínar tankar.

Greinin byrjar soleiðis: »Nazisman var ein parantes«. »Mong kvukku við, tá ein løgtingsmaður herfyri fekk seg at siga soleiðis í einum hørðum orðadrátti í Løgtinginum. Kanska var kjakið, sum stóðst av útsøgnini, eitt fyrivarni um, hvat vit kunnu vænta okkum, tá kanningin eystanfyri av Føroyum undir kalda krígnum sær dagsins ljós. Kanningini stendur danski søguprofessarin Bent Jensen fyri, og orsøkin til óhepnu lýsingina hjá løgtingsmaninum av nazismuni er seinasta bókin hjá professaranum, ið nevnist »Gulag og glemsel«««.

### Í honratøkum við Javnaðar- og Tjóðveldisflokkin

Lat meg gera vart við, at løgtingsmaðurin – sum var í hornatøkum við Javnaðar- og Tjóðveldisflokkin í tinginum henda dagin – var eg, men bókin "Gulag og glemsel" hevur ikki fingið meg at taka til, sum eg gjørdi. – Leggjast kann afturat, at orðadrátturin var heldur ikki serliga harður.

Teir ræðuleikar úr Sovjet og undir øðrum kommunistiskum einaræði, sum ídag alt meiri verða prógvaðir í bókum og tíðarritum eru bert staðfestingar av frágreiðingum, sum áður eru kunngjørd vesturheiminum, og sum vintstri vongurin ongantíð góðtók. Heldur mótmæltu bæði Javnaðar- og Tjóðveldisflokkurin USA og øðrum vesturlendskt sinnaðum londum, sum hava verið okkum góð verja.

»Intelektualisman« og fjølmiðlaheimurin var í stóran mun halgaður vinstravonginum, og mentanin í danska kongaríkinum við m.ø. Otto Gelsted, Hans Kirk, Hans Scherfig, William Heinesen, og Christian Matras, helt heldur ikki av fyri at viðurkenna sær kommunismuna.

Áhugavert kundi verið at nevnt í hesum viðfangi, at sjálvt í Føroyum var so statt, at presturin Richard Wurmbrand, ið tænti - og hevur liði nógv- eystanfyri, hevði ilt við at fóta sær, tí honum varð sýtt atgongd at prædika í onkrum av føroysku kirkjunum, so seint sum í 1970unum, tá hann vitjaði, tí hann var hildin at vera ov víðgongdur ímóti kommunismuni.

### Munur á 74 og 12 árum

Tá eg á tingi segði at "Nazisman var ein parantes", var hetta í tíðarperspektivi, og ikki tí, at eg vardi ræðuleikarnar í nazisman hevði við sær. Eg havi víst á, at "kommunistiska eksperimentið" sum gjørdist ein sorgarleikur, vardi í minsta lagi frá 1917 til 1991, tá múrurin fall - í 74 ár - meðan nazisman hevði sína tíð frá 1933 til 1945, tá USA tók um endan, t.v.s. í 12 ár.

– Eingin kann siga, at eg kom við eini "óhepnari" lýsing, ella tað var nakað, sum fall mær knapliga úr munninum, sum greinskrivarin vil gera tað til.

Sjálvandi sá formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Ejdesgaard, sær eitt høvið á tingi at koma við eini tilvildarligari viðmerking. Hann hevur jú fá onnur verkevni enn at koma við atfinningum.

Í tíðarperspektivi kann sigast, at 12 ár inn í millum 74 ár er ein parantes.

Eg fegnist um, at ein føroyskur blaðmaður nevniliga, Ingi Rasmussen, er kvokkin við, og kanska okkurt fjølmiðlafólk við honum, men bara at taka hetta burtur úr eini heild, eyðkennir ikki serliga góðan fjølmiðlasið, og tænir honnum ikki til heiðurs. Tað tykist, sum um hann er vaknaður av bókini »Gulag og glemsel«.

### Onkur søgubrot

Ígjøgnum seinastu mongu árini hevur ikki verið trot á røddum úr kommunismunnar drúgvføru ræðuleikum við sovjetiskum rættargongdum, loyniløgregluni KGB, sovjetiskum fongslum og fangalegum, GULAG týningarlegunum, fongsulsjúkrahúsum og sinnissjúkarhúsum og øðrum tættum í atsóknum.

Nú eru 30 ár síðani Solsjenitsyn gav út bókina um GULAG týningarlegurnar. Vit minnast eisini Sakharov-hoyringina í Danmark í 1975, við óhugnaligu frásagnunum, hesum sum vesturheimurin ongantíð tók í álvara. Fyri at taka tvey dømi.

Les eitt nú stóra verkið »The black book of Communism«, sum kom út í 1999 við sínum 800 síðum, sum grundgevur fyri teimum 25 milliónunum, sum lótu lívið undir kommunismuni í Sovjet og 65 milliónunum í Kina, hetta sum bert er ein partur. Her sæst eisini hvussu kommunisman er farin við egnum borgarum.

Bókin »Reagan's War«, sum kom út í novembermánaði í fjør vísir eisini sera áhugaverdu ætlanina hjá Kreml at yvirtaka filmsídnaðin í Hollywodd, fyri at fáa tak á heiminum, har Ronald Reagan longu í 1946 – hesin sum ofta varð illa viðfarin av vinstravonginum í Evropu, meðan hann var forseti – stríddist sum sjónleikari ímóti kommunistiskum felagsskapum har eftir krígslok. Hóast hetta, kundi hann fegnast um at vera ein av kvartettini, sum syrgdi fyri, at kommunistiski múrurin fall góð 40 ár seinni - í 1991.

### Ferðin við »Dostojevskij« o.a.

Vit minnast bæði Ungarn, Tjekkoslovakíið og hørðu viðferðina hjá Alexander Dubcek, tá hann í bókini, sum á donskum hevur heitið "Håbet dør sidst" vísir á, at hann uttan at hava nakað at siga, bara var fluttur til eitt fongsul í Moskva, meðan land hansara leið undir harðrendu viðferðini.

Eisini áhugaverda bókin hjá danska blaðmanninum og høvundinum Leif Davidsen, har hann greiðir frá ferðini eftir Volgaánni við ferjuni "Dostojevskij" á heysti í 2000, har hann aftur vitjar støð, sum hann kom til, tá hann var danskur útvarpsmaður í Sovjet í 1980.

Fyri at taka bert tvey av óteljandi dømum, sigur hann m.a. frá, tá kommunistar sprongdu stóru og kendu "Frelsarkirkjuna" í Moskva í luftina, og settu standmynd av Lenin í staðin, og hvussu Jeltsin tók standmyndina niður aftur, og lat nýggja stásiliga

*Framhald á síðu 13*


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Nýtt reinsiverk seks metrar undir jørð



*Umboð frá H. V. Lützen, Tórshavnar býráð og M. E. Leo ganga niðri í reinsiverkinum og skoða verkið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Mánadagin fekk Tórshavnar kommuna handað eitt nýtt mekaniskt reinsiverk, ið skal skilja tað ringasta frá skittvatninum, ið rennur í Sersjantavíkina. Svenn Brimheim, sum hevur gjørt verkætlanina, heldur, at hugburðurin til umhvørvið er broyttur**

UMHVØRVISVERND
*Theodor E. D. Olsen*

Fyri trimum árum síðani fekk Tórshavnar kommuna nýtt reinsiverk, sum varð sett upp í Heimaru Válgaravík, og skittvatnið haðani rennur út uppi við Eystfalssker, sum tey flestu munnu kenna frá sanginum, um dreingin, sum dyrgdi har á staðnum.

Nú hevur Havnin aftur fingið nýtt reinsiverk, sum er sett upp í Sersjantavíkini. Arbeiðstakari hevur verið P/f H. V. Lützen, og Sp/f M. E. Leo, hevur virkað sum ráðgevandi verkfrøðingur.

Svenn Brimheim frá Sp/f M. E. Leo hevur gjørt projektið til hetta nýggja mekaniska reinsiverkið, sum skal taka tað ringasta burturkastið frá kloakkunum, ið eitt nú hoyra til Jonas Broncksgøtu og Djóna í Geil gøtu. Áður hevur nevniliga alt skittvatnið frá kloakkunum runnið beinleiðis á sjógv, og heldur Svenn Brimheim hetta vera eitt tekin um, at hugburðurin hjá býrðasplitikarunum mótvegis umhvørvinum er broyttur seinastu árini. Fyrr hildu fólk nevniliga, at havið var óendaligt, og tí varð tað brúkt sum køstur.

### Seks metrar undir jørð

Nú hevur so Tórshavnar kommuna fingið nýtt mekaniskt reinsiverk í Sersjantavíkini, ið liggur ímillum Skansan og bygningin, ið fyrr hýsti Fiskasøluni og nú rúmar virkseminum hjá Føroya Sparikassa.

Reinsiverkið er staðsett undir jørð á friðaðum øki, og er tí alt sett aftur í upprunaligan stand, og hetta hevur Yvirfriðingarnevndin góðkent.

Reinsiverkið er bygt upp sum heild, og undir jørðini er verkið seks metrar djúpt – ella høgt. Tað veldst um, hvaðani vit skoða hetta nýggja bygningsverkið, sum ikki sæst serliga væl á jarðarflatuni.

Verkið er bygt í trimum høvuðspørtum. Tann fyrsti við sandfangi og yvirrenning við ristskipanum, tann næsti við størri forfellikamari, og tann triði við minni eftirfellikamari. Harumframt er atkoma til tøming, eftirlit og viðlíkahald, og tann samlaða rúmdin er okkurt um 125 tons.

Til ber at ganga inni í sjálvum reinsiverkinum, og ætlanin er, at fólk, sum arbeiða hjá Tórshavnar kommunu, skulu hava røktina um hendi. Eisini er ein eftirlitstunnil gjørdur frá verkinum oman í Sersjantavíkina.

Sum nevnt er eitt reinsiverk longu framman undan, sum rennur oman ímóti Eystfalsskeri, og so løgið tað kann ljóða, sigur burturkastið frá fólki eitt sindur um, hvørji tey eru. Burturkastið frá teimum ymisku býarpørtunum er nevniliga ikki eins, og tað kann vera alt frá pappíri og undirbuksum, til plastikposar og hítir, sum eitt slíkt reinsiverk forðar fyri rennur á sjógv. Harafturat kann slakt vera ringt hjá kloakkunum at hava við at gera, tí meðan til dømis feittið frá havhesti sum einki rennur gjøgnum rørini, kann feittið frá slaktinum um heystið seta seg í rørini.

Eisini dálkar útrenslið frá einum vaski nógv verri enn frá einum wc, av tí at tað jú er gjøgnum eitt vask, at fleiri av teimum størstu dálkingarkeldunum, sum t.d. feitt og kemisk evni, stava, greiðir Svenn Brimheim frá.

### Ikki góð streymviðurskifti

Ein av orsøkunum til, at júst Sersjantavíkin er vald at hýsa einum slíkum reinsiverki er, at streymviðurskiftini í víkini ikki eru av teimum bestu, og tá vestfallið er hálvrunnið er trupult at fáa nakað burtur haðani, og tí er so illa dálkað, sum tað er í Sersjantavíkini.

Svenn Brimheim upplýsir fyri Sosialinum, at hetta verkið tó ikki loysir allar umhvørvistrupulleikarnar í Havnini.

Ein uppgáva, sum liggur eitt sindur longur frammi í tíðini, er at separera skittvatnskloakkir og regnvatnskloakkir. Hesar síðstnevndu áttu helst at verið kallaðar avfalskloakkir, men av tí at danska málið stundum kann elva til misskiljingar, hava fólk, sum arbeiða við slíkum, heldur valt at kalla avfallið fyri regnvatn í hesum sambandi. Ofta hevur kommunan nevniliga lagt kloakkir framvið løkum, og hetta kann vera tvørligt at skilja frá hvørjum øðrum, men tað verður so arbeitt fram ímóti at gera.

Í fyrtsu syftu kunnu vit frøast um, at Sersjantavíkin og økið kring Skansan nú verður betur reinsað enn higartil.

*Framhald av síðu 12*

kirkju byggja aftur. Annað dømi kann eisini nevnast, tá ikki færri enn 3000 fangar á veg við skipi til Gulag gjørdu uppreistur umborð, vórðu hirdir í lastina, sum varð fylt við vatni í minus 30 stigum, og hvussu hesin ísklumpurin við fyrstum fólki á ein ella annan hátt varð lossaður í land. Hetta eru bert tvey dømi av túsundum.

Dømini eru mong túsund. Spennandi bókin hjá foreldrunum hjá kenda og dugnaliga tíðindamanninum Samuel Rachlin, Rachel og Israel Rachlin, »!6 år i Sibirien«, sum kom út í 1982, er eisini gott íkast, fyri at taka nakað »úr bókarúgvuni«.

### Bert annar parturin uppgjørdur

Lat meg í hesum viðfangi siga, at munurin millum nazismuna og kommunismuna er, at uppgjørt varð við nazismuna, meðan kommunisman stendur enn sum ósvaraður spurningur, hóast meiri opið nú er at fáa til vega skjøl fyri pógvum um veruleikar.

Nakað av hesum fáu av mongum túsund dømum eg omanfyri havi nevnt vísa, at í tíðar-perspektivi var "nazisman ein parantes".

Nazisman vardi í 12 ár, og allur heimurin vendi sær ímóti henni, sum rætt var, meðan kommunistiska eksperimentið, sum vinstrivongurin og stórur partur av vesturlendska blaðmannaheiminum vardi í 74 ár, miseydnaðist og kollsigldi. Hóast tað, hava enn ikki øll vent henni baki.

Lat meg til seinast siga, at tað var ikki "Gulag og glemsel" ella nakað, sum Bent Jensen hevur skrivað, sum fekk meg at taka til í løgtinginum, sum eg gjørdi, tí eg havi nevniliga ikki lisið bókina, men heildin í drúgvføru ræðuleikunum og tíðarperspektivið, sum skrivað hevur verið ígjøgnum 20. øldina, kanska serliga seinna helmingin.

Og so heilt til seinast kann eg ikki siga annað enn at tað er við spenningi eg fari at lesa bókina "Gulag og glemsel". Eisini fari eg at hyggja skjølini hjá Bent Jensen ígjøgnum, tá hesi verða løgd fram. Tað kanska fær onnur ávís føroysk fjølmiðlafólk enn Inga Ramussen at vakna og kvøkka við.